ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 26.11.03
J.Nr.: 0.15-220513
Viðgjørt: BLP/jans/jj

# Tilmæli
# til
# aðalstjórarnar í Almannamála-, Mentamála- og Familju- og heilsmálaráðnum

**Frá arbeiðsbólkinum, ið varð settur at viðgera gráøkistrupulleikar ímillum Almanna- og heilsumálastýrið og Mentamálastýrið viðvíkjandi brekaðum.**

## Inngangur

Aðalstjórarnir í Almanna- og heilsumálastýrinum og Mentamálastýrinum settu tann 5. mai 2002 ein arbeiðsbólk til at útgreina tey øki, har samanfalll var millum Almanna- og heilsumálastýrið og Mentamálastýrið viðvíkjandi brekaðum.

Síðani arbeiðsbólkurin varð settur er Almanna- og heilsumálastýrið býtt sundur í tvey aðalráð – Almannamálaráðið og Familju- og heilsumálaráðið. Arbeiðsbólkurin hevur tó valt at halda seg til upprunaliga málsetningin – nevnliga at útgreina tey øki, har samanfall er millum Mentamálaráðið øðrumegin og Almannamálaráðið og Familju- og heilsumálaráðið hinumegin.

Arbeiðsbólkurin var upprunaliga mannaður við tveimum umboðum fyri ávíkavist Almanna- og heilsumálastýrið, Mentamálastýrið og Meginfelag teirra brekaðu. Síðani Almanna- og heilsumálastýrið varð býtt upp í tvey aðalráð, hava tvey umboð fyri Almannamálaráðið og eitt umboð fyri Familju- og heilsumálaráðið luttikið í arbeiðinum.

<u>Limir í arbeiðsbólkinum:</u>

- *Birita Ludvíksdóttir Poulsen*, formaður í arbeiðsbólkinum og ráðgevi/løgfrøðingur í Almannamálaráðnum.
- *Jan Simonsen*, fulltrúi/cand.scient.adm. í Familju- og heilsumálaráðnum. Hevur sitið í arbeiðsbólkinum síðani 1. januar 2003, tá ið Almanna- og heilsumálastýrið varð býtt í tvey.
- *Poul Nolsoe*, fulltrúi/løgfrøðingur í Mentamálaráðnum.
- *Janus Jensen*, undirvísingarleiðari í Mentamálaráðnum.
- *Súsanna Nordendal*, fulltrúi/løgfrøðingur í Almannamálaráðnum. Tók sæti í arbeiðsbólkinum 1. mars 2003 fyri *Jóan Hendrik Svabo Samuelsen*, táverandi ráðgeva/løgfrøðing í Almannamálaráðnum.
- *Doris Hansen*, fyri Meginfelag teirra brekaðu.
- *Anna Suffía Durhuus*, fyri Meginfelag teirra brekaðu.

Arbeiðssetningur:

- at útgreina, hvørji økir talan er um,
- at gera uppskot um, hvussu hesi økir skulu skipast framyvir á bestan hátt fyri brúkaran,
- at gera uppskot um, hvussu Almanna- og heilsumálastýrið og Mentamálastýrið kunnu leggja upp fyri nýtsluvinarligum tænastum, soleiðis at møguligir brúkarar ikki ferðast óneyðugt millum stýrini,
- at meta um og útgreina tey økir, sum hava við Almanna- og heilsumálastýrið og Mentamálastýrið at gera, sum tilmælið um Sernámsfrøði frá juni 2001 leggur upp til.

Aftaná leysliga at hava útgreinað, hvørji øki talan er um, gjørdist tað skjótt greitt fyri arbeiðsbólkinum, at tað ikki var møguligt at svara nøktandi uppá øll punktini í arbeiðssetninginum innanfyri eitt rímiligt tíðarskeið.

Arbeiðsbólkurin hevur í hesum tilmæli stutt greinað, hvørji øki talan er um, men hevur ikki beinleiðis gjørt uppskot um, hvussu hesi skulu skipast á besta hátt fyri brúkaran. Bólkurin hevur ei heldur gjørt beinleiðis uppskot um, hvussu Almannamálaráðið, Familju- og heilsumálaráðið og Mentamálaráðið kunnu skipa meira nýtsluvinarligar tænastur, soleiðis at møguligir brúkarar ikki ferðast óneyðugt millum aðalráðini.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki mett seg hava resursir til at gera greinað og nøktandi uppskot til hesi punktini og metir ei heldur, at hetta er tað rætta , tí talan er um so nógv og ymisk øki, sum hvørt er ein verkætlan í sær sjálvum. Arbeiðsbólkurin hevur ikki mett seg hava møguleika til at koma við góðum og nýtiligum loysnum til øll gráøkjum innan eina rímiliga tíðarfreist.

Arbeiðsbólkurin hevur ístaðin, í samráð við aðalstjórarnar, lagt orku í at kanna, hvussu trupulleikarnir verða loystir í londunum rundan um okkum, og dentur hevur verið lagdur á at finna fram til, hvørjir karmar eiga at verða skaptir í Føroyum fyri at kunna loysa trupulleikarnar á millum annað teimum økjum, sum stutt verða greinað í hesum tilmæli. Í hesum sambandi mælir bólkurin til, at tað verður sett ein formell skipan á stovn, sum skal viðgerða gráøkistrupulleikarnar, ið eru millum landsins myndugleikar.

Tað eru uttan iva fleiri gráøkistrupulleikar , enn teir, ið eru nevndir í tilmælinum, men ætlanin við hesum er at geva eina mynd av teimum trupulleikum, ið eru á økinum í dag.

Tað er ikki partur av arbeiðssetninginum at greina gráøkir ímillum lands- og kommunumyndugleikar viðvíkjandi brekaðum, men loysnin við einum landsstýrisbólki, sum mælt verður til í hesum tilmæli, ger tað eisini møguligt at viðgerða tílíkar trupulleikar.

Hjálagt er eitt uppskot um upprit til landsstýrisfund, ein bókmentalisti við tilfari, sum er nýtt til hetta tilmælið og álitum/tilmælum v.m. sum eru skrivað viðvíkjandi gráøkistrupulleikum. Harumframt er hjálagt eitt organisatiónsdiagram, sum vísir, hvussu nógvar myndugleikar tann brekaði skal venda sær til viðvíkjandi sínum breki.

### Hugtakið "brekað"

Við " brekað " verður í hesum tilmæli hugsað um fólk, ið hava mist ella hava avmarkaðar møguleikar at vera uppi í samfelagslívinum á jøvnum føti við onnur t.v.s. hugtakið lýsir sambandið millum fólkið, ið er tarnað, og umhvørvið. Virkistarnið kann koma av kropsligum, menningarligum ella sansaligum darvi (sjúku), heilsuligum ávum ella sálarligum sjúkum.

Talan kann m.a. verða um sálarliga sjúk fólk, menningartarnað, fólk við likamligum brekum, deyv ella fólk við hoyriskaða og fólk við talutrupulleikum.

## Sektorábyrgd

Sektorábyrgd merkir, at tann almenni myndugleikin, ið veitir tænastur v.m. til borgaran, hevur ábyrgdina av, at tænastan/veitingin er atkomulig ella tøk fyri fólk, ið bera brek. Útboðið av tænastum á brekaðøkinum verður sostatt ikki bert ein uppgáva hjá almannaverkinum, men eisini hjá øðrum myndugleikum, t.d. teimum ið hava ábyrgdina av bústøðum, sjúkrahúsverki, samferðslu, arbeiði, mentan, skúlaverki o.s.fr.

Danmark, Noreg og Svøríki hava sektorábyrgd á brekaðøkinum. Í Føroyum kann sigast, at vit í dag hava sektorábyrgd á brekaðøkinum, av tí, at tað í praksis er soleiðis, at hvør landsstýrismaður hevur ábyrgd av at seta í verk skipanir til brekað innan sítt málsøki. Sektorábyrgdin er tó ikki staðfest við eini løgtings- ella landsstýrissamtykt.

Tað kann tó nevnast, at allir flokkar í Løgtinginum tann 3. desember 1999 skrivaðu undir uppá, at teir tóku undir við eini áheitan frá ST, sum hevði til endamáls at tryggja teimum brekaðu mannarættindi og javnrættindi. Í hesi yvirlýsing stendur, at hugsað eigur at verða um tørvin hjá brekaðum fólki í øllum almennum ætlanum. Eisini er ásett, at brekað fólk hava sama rætt til samfelagslig tilboð, sum øll onnur, og at samfelagsligar forðingar ikki skulu vera fyri hesum.

Í ST-fyrimyndarreglunum um javnar møguleikar fyri fólk, ið bera brek, sum vóru útgivnar í Føroyum í november 1999, er grundhugsanin, at tann myndugleikin, ið varðar av einum málsøki, skal syrgja fyri, at brekað fáa javnbjóðis møguleikar við aðrar borgarar. Viðvíkjandi útbúgving verður tað t.d. sagt, at brekað eiga at fáa javnbjóðis undirvísingartilboð og innliman í barnaskúla, ungdómsundirvísing og hægri útbúgving við javnbjóðis møguleikum fyri børn, ung og vaksin, sum eru brekað. Tjóðirnar eiga at tryggja, at útbúgving teirra brekaðu er ein innlimaður partur í útbúgvingarskipanini.

Í yvirlýsingini verður ásett, at skúlamyndugleikarnir hava ábyrgd av, eftir tørvi, at innlima brekað fólk í skúlaskipanini. At útbúgva brekað fólk, skal verða ein innlimaður partur av landsins útbúgvingarætlan, lesiætlan og skúlaskipan.

## Markamótstrupulleikar

Sektorábyrgdin førir í fleiri førum við sær, at aðalráð vísa teim brekaðu frá sær; - kenna ikki ábyrgd av at taka teirra trupulleikar upp, av tí, at tey meta, at trupulleikin ikki hoyrir heima hjá teimum, men at okkurt annað aðalráð skal loysa trupulleikan.

Tað skapar stórar trupulleikar fyri brekað og teirra avvarðandi, at tey mugu venda sær til so nógvar ymiskar myndugleikar í einum máli, og vandi er fyri, at eitt mál steðgar upp, áðrenn trupulleikin er loystur, av tí, at semja ikki er um, hvør myndugleiki skal loysa málið.

Tað er eingin loyna, at síðani landsstýrið var býtt sundur í aðalráð, og hvør landsstýrismaður fekk ábyrgd fyri sínum øki, eru tað komnar fleiri gjáir millum landsins myndugleikar. Hetta ávirkar serliga tey brekaðu, ið hava brúk fyri serligum loysnum fyri at virka í samfelagnum . Hesi hava trupulleikar við at samskifta við myndugleikarnar. .

Foreldur avvarðandi og feløg teirra brekaðu hava í longri tíð víst á, at ein stórur trupulleiki er, at eingin samskipan er um tiltøkini, sum verða sett í verk viðvíkjandi brekaðum.

Foreldur og avvarðandi ganga ofta eina oyðimarkargongd frá myndugleika til myndugleika fyri at fáa hjálp, vegleiðing og kunning um viðurskiftini. Ymiskir myndugleikar seta tiltøk í verk uttan at kunna hvønn annan , og eingin heild er í fyriskipanina av viðurskiftunum hjá tí einstaka brekaða.

Tørvur er á eini „heildarloysn" fyri tann brekaða og familjuna. Ein heildarloysn merkir, at foreldur og avvarðandi fáa nøktandi kunning og hjálp umvegis eina einfalda skipan, har fáir lyklapersónar samskipa tiltøkini við tí brekaða í miðdeplinum.

*Trupulleikar millum stovnar*
Tað eru tøtt skott ímillum stovnar, serliga tá tað ræður um fígging, tað vil siga, at stovnar kunnu bert mæla øðrum stovnum til eitthvørt tiltak, t.d. viðgerð, ið kostar. Hetta er ein orsøk til, at fólk við breki ella avvarðandi teirra renna frá Peri til Pól.

Fyri at samskipa dagliga lívið hjá tí einstaka brekaða er tørvur á at samskipa vitan, ráðgeving og hjálpartiltøk hjá einari røð av myndugleikum/ stovnum/ skúlum/nevndum o.ø. Hesi eru ikki partar í málinum samstundis, men hava størri og minni ávirkan til ymiskar tíðir. Talan kann vera um:

Heilsuverkið: *Sjúkrahús, kommunulæknar, serlæknar og tannlæknar.*

Almannaverkið: *Almannastovan, sosialar nevndir, barnaverndarnevndir, sosialráðgevar, brektoymi, hjálpartól og stuðulsfólk, heilsusystrar.*

Kommunumál: *Barnagarðar, námsfrøðingar, sosialar nevndir, sernámsfrøðingar, stuðlar.*

Skúlaverkið: *Sernámsdepilin, skúlar, skúlaleiðarar, serlærarar og lærarar.*

Arbeiði og samferðsla: *Arbeiðsloysisskipanin, arbeiðsmarknaður, stuðul við barnsburð, samferðsla.*

*Millum fakbólkar og/ella fakfeløg*
Trupulleikar standast av, at stuðlar í skúlanum og stuðlar uttan skúlagátt hjá sama barni ikki samstarva. Ser-/talilærari og fys./ergoterapeut arbeiða hvør við sínum lítla øki uttan at hyggja nóg væl eftir heildini. Eitt fakfólk kann illa mæla øðrum til nakað ávíst, tí tá kann starvsfólkið fara yvir um mark. Ein fysioterapeutur kann t.d. bert mæla til, ikki seta í verk, viðgerð í skúla/barnagarði, av tí, at hetta skal gjaldast av játtan, ið onnur ráða yvir.

Fysioterapeutar kunnu ikki geva viðgerð í fólkaskúlanum, men á skúlanum í Sernámsdeplinum ber til at geva viðgerð. Hetta tí skúlin hevur verið ein forsorgarskúli undir danskari skipan. Hetta ger ein mun millum teir næmingar, ið ganga á Sernámsdeplinum og teir við breki, ið ganga í skúla í heimbygdini.

*Markamótstrupulleikar viðvíkjandi øðrum málsøkjum*
Trupulleikarnir við at brekað tíðum detta niðurímillum teir ymisku myndugleikarnir eru størstir ímillum Almannamálaráðið, Familju- og heilsumálaráðið og Mentamálaráðið, men trupulleikar kunnu eisini verða ímillum Vinnumálaráðið og hini aðalráðini, av tí, at Vinnumálaráðið hevur samferðslu og arbeiðsmarknað sum málsøki. Harumframt verða eisini gráøkir ímillum kommunurnar og landið viðvíkjandi brekaðum, tá ið fleiri øki verða løgd út til kommunurnar at umsita. Barnaansingarøkið er lagt út til kommunuarnar at umsita tann 1. apríl 2000, og væntandi verður forsorgarøkið, eldraøkið og barnaverndarøkið eisini lagt út til kommunurnar at umsita í nærmastu framtíð. Hetta fer at skapa gráøkistrupulleikar ímillum Kommunudeildina í Løgmálaráðnum og hini aðalráðini.

## Galdandi lógir og reglur á økinum

Tørvur er á at áseta lógir og reglur á teim ymisku málsøkjunum, ið tryggja, at brekað ikki detta niðurímillum tær ymisku skipanirnar og fáa eitt verri tilboð, enn aðrir borgarar í Føroyum.

Galdandi lógir viðvíkjandi brekaðum eru ikki nøktandi. Tørvur er á nýggjari brekaðlóg, forsorgarlóg, psykiatrilóg, lóg um serundirvísing fyri vaksin o.a. Eisini er tørvur á at áseta í kunngerð ella í vegleiðing innan tey ymisku málsøkini reglur um, hvussu brekað verða best møguligt vard.

*Lóg um brekað og forsorgarlóg*
Almannamálaráðið ferð í næstu framtíð í holt við at tilevna reglur á forsorgarøkinum. Ætlanin er fyrst at fara í holt við reglur viðvíkjandi brekaðum. Støða er ikki tikin til, um hetta skal gerast í einari serstakari lóg um brekað ella um hetta skal gerast, sum ein partur av forsorgarlógini.

*Lóg um sernámsfrøði*
Mentamálaráðið er farið undir at fyrireika lóg um sernámsfrøði. Lógararbeiðið skal í mest møguligan mun taka atlit til innihaldið í tilmælinum um sernámsfrøði, orðaskiftið á tingi og hoyringssvarini frá áhugabólkunum. Innihaldið fer m.a at skipa fyrisitingarligu og skúlaligu viðurskiftini og at áseta reglur um skipan av undirvísingini kring landið. Tað er neyðugt at hetta verður gjørt í neyvum samstarvi við Almannamálaráðið.

Áðrenn støða verður tikin til innihaldið í lógini, skal Mentamálaráðið viðgera og taka avgerð um eina røð av prisippiellum spurningum. Mælt verður til, at henda viðgerð fer fram í tøttum samstarvi við Almannamálaráðið og Familju- og heilsumálaráðið.

*Lóg um serundirvísing fyri vaksin*
Í Danmark varð ein lóg um serundirvísing fyri vaksin sett í gildi 1. januar 1980, jb. "lov nr. 145 af 25.03.2002 om bekendtgørelse af lov om specialundervisning for voksne". Tørvur er á eini líknandi lóg í Føroyum. Tað er Mentamálaráðið, ið hevur hetta málsøkið um hendi.

Sambært hesi lóg er tað ábyrgdin hjá amtinum at veita undirvísing og sernámsfrøðiligan stuðul til fólk við likamligum- og sálarligum breki, ið eru skrásett í amtinum. Undirvísingin skal miðja ímóti at avmarka ávirkanina av brekinum hjá viðkomandi.

Amtið syrgir fyri neyðugum flutningi til og frá undirvísingarstaðnum fyri tey brekaðu. Amtið kann stovnseta undirvísingarstovnar fyri brekað. Amtið rindar útreiðslurnar, ið standast av hesum fyriskipanum.

Omanfyrinevndu lógir og reglur eiga at verða gjørdar í samstarvi ímillum tey ymisku aðalráðini, ið hava við brekað at gera, soleiðis at samanhangur er í tilboðnum til tey brekaðu.

## Dømi um gráøkistrupulleikar
Fyri at lýsa, hvørjir trupulleikar kunnu standast av sektorábyrgdini, verða niðanfyri givin domir uppá gráøkistrupulleikar, ið eru í dag. Arbeiðsbólkurin mælir samstundis til, hvør myndugleiki eigur at arbeiða víðari við at finna loysn á trupulleikanum.

*Sernámsdepilin*
Uppgávurnar hjá Sernámsdeplinum eru at veita skúlum, stovnum, starvsfólkum, foreldrum o.ø. ráðgeving á sernámsfrøðiliga økinum umframt vegna Mentamálaráðið at umsita tímatilfeingið, sum verður veitt børnum og ungum, sum hava serligan tørv. Sernámsdepilin skal fremja virksemi sítt neyvum samstarvi við Almannaverkið.

Hendan uppgáva skapar í sær sjálvum gráøkistrupulleikar ímillum Mentamálaráðið og Almannamálaráðið og fyri so vítt eisini ímillum Mentamálaráðið og Familju- og heilsumálaráðið.

Í *Tilmæli um Sernámsfrøði* frá 29. juni 2001 verður staðfest, at ov lítið samstarv er millum tær ymisku tænastueindirnar so sum heilsuverk, skúla, stuðulsskipan, heim og frítíðarheim, og at foreldur og

starvsfólk tí sakna eina heildarloysn fyri hvørt einstakt barn. Tørvur er á einum føstum fakligum bindiliði, kontaktpersóni, millum familjuna og tænasturnar

Sum sagt, arbeiðir Mentamálaráðið í løtuni við einum lógaruppskoti, ið skal betra um skipanina. Mælt verður til, at hetta arbeiðið verður gjørt í tøttum samstarvið við Almannamálaráðið og Familju- og heilsumálaráðið.

*Undirvísing í fólkaskúlanum av brekaðum børnum*
Í verandi skúlaskipan fáa børn við breki onga skipaða upplæring um sjálvt brekið í skúlanum. Hetta sama er galdandi fyri hini børnini í skúlaflokkinum og fyri fakpersónar, sum eru um barnið. Í ávísum førum tekur heilsuverkið sær av at upplæra børn við breki t.d. tekur diabetesambulatoriið sær av at læra børn og foreldur upp um medisinering, kost, motión og annað. Eisini børn við astma fáa eina ávísa upplæring í at nýta medisin rætt. Men út yvir tað tekur heilsuverkið sær ikki av at undirvísa innan fyri skúlagátt t.d. um sjúkuna ella brekið, um støðuna barnið er í, og um hvørji krøv tað setur til hini børnini, til lærarar og námsfrøðingar, bæði undir vanligum umstøðum, men eisini tá eitthvørt er áfatt.

Heilsusystirin á skúlanum tekur sær av heilsuni hjá børnum, og er nakað áfatt, vísir hon barnið víðari til serkøn fólk at taka sær av. Hon undirvísir vanliga børnunum um heilsu t.v.s. um náttúrligu menningina og um sunnan livihátt. Heilsusystirin tekur sær ikki av at undirvísa í sambandi við børn við breki, av tí, at hetta er eitt øki, sum spennir ógvuliga víða, og tí hevur hon ikki møguleika at fasthalda eitt ávíst støði í sínum serkunnleika á økinum. Tað eru starvsfólk frá heilsuverkinum, ið sita við hesum serkunnleikanum, og tí er tað ein trupulleiki millum Mentamálaráðið og Familju- og heilsumálaráðið, hvør hevur ábyrgdina av, at henda undirvísing verður framd.

Í onkrum førum koma avvarandi av sínum eintingum, uttan nakra samsýning, á skúlan at greiða frá, men hetta er ikki nøkur føst skipan og hongur saman við góðvilja frá teim avvarandi, ið frammanundan ofta eru sperd.

Hetta er ein gráøkistrupulleiki ímillum skúlaverkið og heilsuverkið. Mælt verður til, at Mentamálaráðið arbeiðir víðari við loysn á hesum trupulleikanum.

*Alv-skúlin*
Spurningurin viðvíkjandi ALV-skúlanum er, hvør skal hava ábyrgdina av skúlanum. Er tað Mentamálaráðið, ið hevur ábyrgdina av undirvísing, ella er tað Almannamálaráðið, ið hevur ábyrgd av teim brekaðu. Hetta tykist verða trupult at finna semju um. Mælt verður til, at Almannamálaráðið í samstarvi við Mentamálaráðið arbeiðir víðari við at loysa hendan trupulleikan.

*Stuðulsfólkaskipanin*
Markamótstrupulleikin viðvíkjandi stuðulsfólkaskipanini er, at stuðul kann verða veittur sambært fólkaskúlalógini, forsorgarlógini og barnaforsorgarlógini. Stuðulin verður veittur til næmingin. Tað vil siga, at um ein stuðul verður veittur til eitt barn, ið gongur í barnagarð, kann stuðulin bert ansa eftir tí eina barninum. Hetta er ein dýrari skipan fyri stovnarnar, av tí, at teir ikki kunnu seta ein stuðul til at taka sær av øllum teim børnum, ið eru t.d. deyv og eitt verri tilboð fyri brekaða barnið, av tí at stovnurin kundi sett ein serkønan í t.d. deyvamálið til at tikið sær av deyvum børnum. Hetta tilboðið kundi verið skipað soleiðis, at tilboð til deyv verður bert givið á ávísum vøggustovum/barnagørðum í landinum.

Um foreldur at deyvum børnum venda sær til kommununa, ið hevur ábyrgd av barnagarðum, vísir kommunan víðari til Almannamálaráðið, ið sambært forsorgarlógini hevur ábyrgd av brekaðum. Um foreldrini venda sær til Almannamálaráðið, vísir Almannamálaráðið víðari til Mentamálaráðið, sum hevur ábyrgd av undirvísing. Soleiðis gongur málið í klingur og eingin tekur ábyrgd fyri at finna eina loysn á málinum.

Almannamálaráðið arbeiðir í løtuni við at umskipa stuðulsfólkaskipanina. Mælt verður til, at Almannamálaráðið í samstarvi við Mentamálaráðið arbeiðir við at loysa omanfyrinevnda gráøkistrupulleika.

*Stuðulsfólk í fólkaskúlanum*
Síðan fólkaskúlalógin frá 1979 kom í gildi eru alt fleiri næmingar við breki eftir ynski foreldranna komnir í fólkaskúlan. Gongdin hevur verið, at skúlin hevur fingið tyngri og tyngri uppgávur, bæði av tí, at hesir næmingar eru vorðnir fleiri og av tí, at nógvir av hesum næmingum eru álvarsliga tarnaðir/brekaðir. Tey fyrru árini, tá ið talan var um lutfalsliga fáar slíkar næmingar og rúmari fíggjarkarmar, var sjáldan settur spurningur við, hvørt talan var um undirvísing ella annan stuðul. Tímajáttanin til serligan tørv rakk sum oftast til bæði undirvísing og til annan stuðul.

Sum árini hava gingið, er spurningurin um heimildir ella vantandi heimildir er vorðin alt meira avgerandi í sambandi við útreiðslur á fíggjarjáttanini hjá ráðum og stovnum. Í løtuni er meginreglan tann, at Almannaverkið rindar fyri stuðul til næmingar við breki eftir skúlatíð, meðan Mentamálaráðið rindar fyri stuðul í skúlatíð í sambandi við undirvísing.

Hetta hevur havt við sær, at næmingar, ið hava tørv fyri persónligum stuðli ella praktiskari hjálp, í mongum førum sita hjálparleysir í skúlanum av tí, at játtanin, sum ofta er ov lítil til undirvísingarligan stuðul, als ikki røkkur til praktiskan stuðul.

Mælt verður til, at Mentamálaráðið í samstarvi við Almannamálaráðið arbeiðir víðari við loysn á hesum gráøkistrupulleikanum.

*Hjálpartól*
Markamótstrupulleikin viðvíkjandi hjálpartólum er, at Hjálpitólamiðstøðin, ið er ein stovnur undir Almannastovuni, umsitir og fær til vega funktiónshjálpitól til varandi nýtslu hjá einstaklingum, herundir avlamisbilar og íbúðarbroytingar, meðan Mentamálaráðið játtar stuðul til uppseting av lyftum, umbygging osv. av skúlum, og kommunurnar gjalda fyri hølini til skúlabygningar.

Mentamálaráðið játtar hjálpartól, tá ið barnið er í skúla, men tað er skúlin, ið fær hjálpartólið. Tá barnið er farið úr skúlanum, stendur hjálpartólið eftir og verður kanska ikki nýtt aftur.

Harumframt kemur tað fyri, at barnið fær teldu (sum hjálpartól) bæði frá skúlanum og frá Hjálpitólamiðstøðini og hevur sostatt 2 teldur.

Fysioterapeutur ella annað fakfólk í sjúkrahúsverkinum ella á Sernámsdeplinum mæla til hjálpitól til brekað fólk. Tað er grein 18-ráðið á Almannastovuni, ið tekur avgerð eftir tilmæli frá Hjálpartólamiðstøðini. Hetta er ein tung og long gongd, ið nógv eru ónøgd við. Tað er eingin automatikkur í hesi skipan: Børn vaksa úr skóm, korsettum, koyristólum, men hvørja ferð skal søkjast av nýggjum.

Mælt verður til, at Almannamálaráðið arbeiðir víðari við at finna eina loysn á hesum trupulleikanum, av tí, at Hjálpartólarmiðstøðin hoyrir til málsøkið hjá landsstýrismanninum í almannamálum.

*Teknmálstulkatænastan*
Teknmálstulkatænastan tekur sær av øllum virksemi í sambandi við tulkingar millum deyv og hoyrandi. Markamótstrupulleikin viðvíkjandi Teknmálstulkatænastuni er, hvørt tað er Almannamálaráðið, sum burturav skal taka sær av stovninum, ella um Teknmálstulkatænastan eisini skal verða umfatað av sektorábyrgd, soleiðis at hvørt aðalráð sær fær ábyrgd av at rinda útreiðslur fyri deyvatulk, tá ið deyv fólk hava tørv á tulki innan teirra málsøki.

Av tí at Teknmálstulkatænastan í dag er ein stovnur/tænasta undir Almannamálaráðnum, verður mælt til, at Almannamálaráðið arbeiðir víðari við at finna eina loysn á hesum trupulleikanum.

*Trupulleikar hjá deyvum børnum frá 0-7 ár*
Sum við øllum gráøkistrupulleikunum, er trupulleikin hjá deyvum børnum frá 0-7 ár, at ov nógvir myndugleikar eru inni í málinum, tá ið tað snýr seg um dagstovnatilboð til tað einstaka deyva barnið.

Dagstovnaøkið er lagt út til kommunurnar at umsita í 2000. Yvirskipaðu ábyrgdina fyri økið hevur Familju- og heilsumálaráðið. Sernámsdepilin, ið er stovnur undir Mentamálaráðnum, veitir undirvísing í teknmáli til tað deyva/tunghoyrda barnið og til avvarðandi, ið eru rundan um barnið, herundir lærarar og námsfrøðingar. Børn, ið eru deyv/tunghoyrd kunnu fáa hjálpartól sambært forsorgarlógini og koma tí eisini undir Almannamálaráðið.

Deyv/tunghoyrd børn verða sostatt ein gráøkistrupulleiki ímillum bæði kommunur og land, og harumframt ímillum mentamál, heilsumál og almannamál.

Í Føroyum eru tað ikki nógv deyv/tunghoyrd børn, so námsfrøðingunum á dagstovnunum úti á bygdunum vanta serkunnleika í at samskifta við hesi børn við tað at tað ganga fleiri ár ímillum, at tílík børn koma á stovn. Sum oftast hava hesi deyvu/tunghoyrdu børnini eisini onnur brek, ið gera, at tey hava tørv á stuðli í dagstovnunum. Kommunan rindar ikki fyri hesar stuðlar, og er tað tí torført at samskipa arbeiðið millum stuðlar og námsfrøðingar.

Dagstovnurin á Argjum hevur upparbeitt sær kunnleika til at taka sær av deyvum/tunghoyrdum børnum og børnum, ið hava deyv/tunghoyrd foreldur. Dagstovnurin hevur eina stovu, har alt samskiftið fer fram á teknmáli.

Trupulleikin hjá dagstovninum á Argjum er vantandi orka bæði til at halda kunnleikan við líka og til at fáa til vega hjálpartólini, ið tørvur er á (barnið má søkja um hjálpartol sum persónligur stuðul og tekur hettar langa tíð). Dagstovnurin má eisini søkja kommununa um fíggjarligan stuðul til tað eyka arbeiði, ið børnini krevja. Dagstovnurin má tískil venda sær til fleiri ymiskar myndugleikar, og krevur hettar alt ov nógva umsiting og ger arbeiði teirra óneyðuga tungt.

Virksemið hjá Sernámsdepilinum umfatar øll børn í aldrinum 0-18 ár, men Sernámsdepilin hevur ikki orku til at taka sær av barnagarðsbørnunum, hettar mest vegna vantandi arbeiðskraft. Tó sigur Sernámsdepilin, at tey eisini bjóða námsfrøðingum á skeið saman við lærarunum. Í løtuni vantar Sernámsdepilin ein teknmálsráðgeva, men eisini fíggjarliga orku. Sernámsdepilin eftirlýsir einum rundskrivi ella kunngerð, ið ásetur viðurskiftini neyvari.

Undirvísingin í teknmáli til bæði barnið sjálvt og foreldur, stuðlar og námsfrøðingar er sera avmarkað. Tað er umráðandi fyri undirvísingina í fólkaskúlanum, at barnið dugir teknmál, tá ið tað byrjar í skúlanum.

Ein loysn á hesum trupulleikanum er, at kunngerð verður tilevnað, sum ásetur, at ein ávísur stovnur, t.d. dagstovnurin á Argjum, verður landsstovnur fyri deyv børn undir skúlaaldri í Føroyum. Hettar fyri at halda kunnleikan við líka, so at børnini fáa neyðuga undirvísing og menning. Í kunngerðini verður eisini ásett, hvør skal gjalda fyri undirvísing frá teknmálsráðgevanum til starvsfólkið á landsstovninum. Mælt verður til, at Familju- og heilsumálaráðið, tó í tøttum samstarvi við Almannamálaráðið og Mentamálaráðið, arbeiðir víðari við at tilevna kunngerð á hesum økinum, av tí at dagstovnaøkið er teirra málsøkið.

*Afasi*
Eitt dømi eru afasisjúklingar, tað vil siga sjúklingar, ið fáa blóðpropp ella skaða í talisentrið í heilanum, soleiðis, at sjúklingarnir ikki fáa samskift. Hesir sjúklingar fáa eitt alt annað enn nøktandi tilboð frá almennu skipanini í dag. Orsøkin til hetta er, at tilboðið ikki er nóg væl samskipað ímillum Sernámsdepilin og heilsuverkið. Tað er ikki nokur greið mannagongd galdandi um fráboðan frá heilsuverkinum til Sernámsdepilin, tá ið ein nýggjur afasisjúklingur er útskrivaður av Landssjúkrahúsinum, og undirvísingin er ov illa samskipað kring landið, t.d. kann nevnast, at um ein persónur fær afasi í juni mánað, fær hann ikki undirvísing fyrr enn í september, av tí, at lærarar eru í summarfríð. Hetta gongur út yvir lekingina av sjúklinginum.

Tá ið sjúklingarnir, ella teirra avvarðandi, venda sær til sjúkrahúsverkið, vísir sjúkrahúsverkið teimum víðari til Sernámsdepilin. Venda tey sær til Sernámsdepilin, vísir Sernámsdepilin ábyrgdina víðari til Sjúkrahúsverkið.

Ein annar trupulleiki er, at afasisjúklingar fáa undirvísing frá talilærara frá Sernámsdeplinum, meðan teir eru innlagdir á sjúkrahúsini, men tá ið sjúklingurin er útskrivaður, verða hesir tímar játtaðir sum serstøk frítíðarundirvísing í tann mun tímar eru eftir. Undirvísingin verður so givin av lokalum talilærara. Henda skipan er alt ov tilvildarlig, og allir sjúklingar fáa ikki javbjóðis møguleika til undirvísing.

Arbeiðsbólkurin metir, at hesin trupulleiki kann verða loystur við, at eitt rundskriv verður tilevnað, sum ásetir greiðar mannagongdir um arbeiðsbýti og ábyrgd viðvíkjandi afasisjúklingum. Í rundskrivinum eigur eisini at verða ásett, hvussu og nær fráboðað verður frá heilsuverkinum til Sernámsdepilin, og hvussu undirvísingin skal samskipast kring landið. Mælt verður til, at Familju- og heilsumálaráðið arbeiðir víðari við einum rundskrivi viðvíkjandi afasisjúklingum.

*Serundirvísing til sálarsjúk*
Nógv sálarsjúk hava vánaliga skúlagongd ella eru steðgað upp í einari útbúgving orsakað av teirra sjúku og/ella lívskorum. Tey sálarsjúku hoyra í dag til psykiatriøkið, ímeðan undirvísing av teimum hoyrir til Sernámsdepilin ella skúlaverkið.

Tað er týdningarmikið at fáa samskipað skúlagongdina hjá teimum sálarsjúku betur við psykiatrisku viðgerðarskipanina. Tað er fyrst og fremst týdningarmikið at fáa samskipað skúlagongd og viðgerð í samband við barna- og ungdómspsykiatri, men eisini tey vaksnu sálarsjúku, sum eru afturúrsigld á økinum, hava tørv á undirvísing, soleiðis at tey verða meira sjálvbjargin.

Familju- og heilsumálaráðið arbeiðir í løtuni við at betra um viðurskiftini hjá sálarsjúkum í sambandi við at álit um Heildarpsykiatri í Føroyum varð lagt fyri løgtingið til aðalorðaskifti á vári 2003. Mælt verður til, at Familju- og heilsumálaráðið í hesum sambandi eisini arbeiðir við at finna eina loysn viðvíkjandi serundirvísing til sálarsjúk.

*Sertannlæknaviðgerð*
Síðan einaferð í 1930´unum hevur taleinstituttet í Keypmannahavn stýrt teimum centraliseraðu viðgerðunum hjá føroyskum og grønlendskum børnum við viðføddum andlitsbreki. Fyri at spara hesum fólkum at ferðast niður til hvørt sindur gjørdi Gómaráðið av í 1970 at flyta miðvísu kanningarnar til Havnar, har Skúlin á Trøðni kom at virka sum føroyskt taliinstitutt, og nógvar av neyðugu viðgerðunum vóru útdeligeraðar til fakfólkið har. Sernámsdepilin yvirtók í 1992 virksemið hjá Skúlanum á Trøðni, og tí er sertannlæknaviðgerð enn í dag ein partur av virkseminum hjá Sernámsdeplinum.

Hetta merkir, at í løtuni eru bæði journalir og annað tilfar viðv. fólkunum við andlitsbreki í Sernámsdeplinum umframt, at viðgerð eisini fer fram har.

Trupulleikin er, at fólkaskúlalógin, sum Sernámsdepilin er umfataður av, bert heimilar undirvísing og ráðgeving, tað vil siga ikki sertannlæknaviðgerð. Sernámsdepilin hevur tí fingið boð frá Mentamálaráðnum um at verandi avtalur um viðgerð skulu halda áfram, men at ongar nýggjar avtalur skulu gerast.

Neyðugt er, at støða verður tikin til, hvør myndugleiki skal taka sær av sertannlæknaviðgerð frameftir. Tað kann verða almannaverkið við heimild í forsorgarlógini, ella heilsuverkið við heimild í tannlæknalógini ella sjúkrahúsverkslógini.

Mælt verður til, at Familju- og heilsumálaráðið í samstarvi við Mentamálaráðið arbeiðir víðari við at finna eina loysn á hesum trupulleikanum.

**Hvussu verður gráøkistrupulleikar loystir í Danmark og Noreg**

Niðanfyri verður lýst, hvussu gráøkistrupulleikar á brekaðøkinum verða loystir í londunum rundan um okkum.

***Danmark***

Í Danmark verður brekaðøkið skipað við sektorábyrgd. Hetta hevur havt við sær, at neyðugt varð at seta ein samskipandi ráðharrabólk fyri at samskipa gráøkistrupulleikar á brekaðøkinum. Í 1999/2000 varð tí ein ráðharrabólkur settur, har arbeiðsmálaráðharrin, fíggjarmálaráðharrin, granskingarráðharrin, mentamálaráðharrin, almannamálaráðharrin, ferðslumálaráðharrin, undirvísingarmálaráðharrin og íbúðarmálaráðharrin luttaka.

Ráðharrabólkurin hevur til endamáls, við útgangsstøði í ST -Fyrimyndarreglunum um at útvega javnlíkar møguleikar fyri brekað fólk, at viðgera trupulleikar, sum ganga uppá tvørs av sektorum og sum ikki eintýðugt eru fevndir av sektorábyrgdini.

Við setan av ráðharrabólkinum er eitt breitt forum skapað fyri menning av politikki fyri brekaðum uppá tvørs av teim ymsu aðalráðunum, og ein góður karmur kring arbeiðið við at seta í verk fyrimyndarreglurnar hjá ST.

Á hvørjum ári leggur ráðharranevndin eina ársfrágreiðing fram, har greitt verður frá tí framtaksemi og teimum lógarbroytingum, verkætlanum osv., ið hava verið framd í árinum.

*(Kelda: Beretning om den handicappolitiske udvikling 1999/2000)*

***Noreg***

Í Noreg hevur almannamálaráðharrin samskipandi ábyrgdina fyri brekaðum. So hvørt sum tað eydnast at seta í verk sektorábyrgdina, eru tað fleiri og fleiri aðalráð, ið fáa abyrgd fyri brekaðum.

Ráðharrabólkurin er tilnevndur av norsku stjórnini og skal hjálpa almannamálaráðharranum í at samskipa politikkin á hesum øki. Bólkurin er samansettur av ráðharrum (ella "viceministre") frá 11 aðalráðnum. Formaðurin í bólkinum er almannamálaráðharrin. Í serligum førum kann ráðharrabólkurin verða víðkaður í eitt tíðaravmarkað skeið við øðrum ráðharrum, t.d. tá ið eitt lógaruppskot skal leggjast fyri Stórtingið.

Týdningarmiklar uppgávur hjá Ráðharrabólkinum eru:

- at geva ráð um hvussu politikkurin fyri brekað kann samskipast,
- viðgera mál, ið krevja luttøku frá fleiri aðalráðum, fyri at finna eina loysn,
- fylgja upp uppá "Handlingsplanen for funktionshæmmede" (1998 – 2002) í Noreg,

- hjálpa til í arbeiðinum við at tilevna lógaruppskot, aðalorðaskifti o.a., ið skal leggjast fyri Stórtingið til viðgerðar,
- geva ráð og vegleiðing um raðfestingar viðvíkjandi fíggjarætlanum á brekaðøkinum,
- hava samskifti við "Statens råd for funktionshæmmede".

Á fundunum verða fyrilestrahaldarar uttanifrá av og á bjóðaðir við fyri at upplýsa um frágreiðingar/verkætlanir ella at varpa ljós á viðkomandi trupulleikar.

Ráðharrabólkurin hevur fund uml. 5-6 ferðir um árið. Á fundarskrá standa fyrst og fremst mál, sum krevja politiska viðgerð og greining.

Til at fyrireika fundir í ráðharrabólkinum og fylgja upp uppá fundirnar, er ein samsvarandi arbeiðsbólkur við embætisfólkum frá teimum somu aðalráðunum (samskipanarbólkurin) settur. Hesin bólkurin umrøður eisini trupulleikar/samskipan, sum ikki krevur viðgerð á politiskum støði.

Í Noreg hevur verið ein ráðharrabólkur fyri tann samlaða politikkin á brekaðøkinum í meira enn 10 ár. Tað eru tær einstøku stjórnirnar ið gera av, um tær vilja hava ein slíkan ráðharrabólk.

*(Kelda: Stortingsmelding nr. 40 frá 2002-2003 om nedbygging av funksjonshemmede barrierer: Strategier, mål og tiltak i politikken for personer med nedsatt funksjonsevne, Det kongelige socialdepartement, Norge og Inge Ovesen, skrivari í ráðharrabólkinum)*

***Svøríki***
Svenska stjórnin setti í 1995 ein ráðharrabólk til at taka sær av at samskipa gráøkistrupulleikar á brekaðøkinum. Við setanini ynskti svenska stjórnin at varpa ljós á brekaðøkið og markera, at brekaðøkið hevur stóran týdning fyri stjórnina.

Í ráðharrabólkinum sita almannamálaráðharrin, samskiftismálaráðharrin, fíggjarmálaráðharrin, Útbúgvingarmálaráðharrin, arbeiðsmálaráðharrin, mentamálaráðharrin og innanríkismálaráðharrin. Um tørvur er á tí, kunnu aðrir ráðharrar verða innkallaðir til fundar.

Uppgávurnar hjá ráðharrabólkinum eru m.a., at:
- samskipa brekaðøkið,
- finna loysnir á gráøkistrupulleikum
- umrøða fíggjarliga tørvin á økinum í samband við fíggjarlógina,
- umrøða og tilevna eina strategi á brekaðøkinum,
- hava samskifti við feløg teirra brekaðu.

Almannamálaráðharrin er formaður í ráðharrabólkinum og leiðir sostatt arbeiðið í bólkinum.

*(Kelda: Handikappolitik i Norden, strategier for likestillingsarbejdet i de nordiska landerna, Nordiska nemden for handicapfrågor, NNH 4/1997)*

**Uppskot um loysn á gráøkistrupulleikum í Føroyum**
Mett verður, at tað eisini í Føroyum er neyðugt at seta ein líknandi landsstýrisbólk, sum tey hava í Svøríki, Noreg og í Danmark, til at taka sær av at loysa trupulleikar viðvíkjandi gráøkjum innan brekaðøkið.

Á nógvum av teimum økjum, ið trupulleikar eru viðvíkjandi gráøkjum ímillum mentamál og almanna- og heilsumál, liggja longu drúgv og væl úr hondum greidd álit, sí hjálagda bókmentalista. Trupulleikin er, at nógv av hesum álitum ikki eru sett í verk.

Orsøkin til hetta er møguliga tann, at í flestu málum viðvíkjandi gráøkistrupulleikum vantar politisk støðatakan í málinum. Tær neyðugu politisku støðutakanirnar, ið skulu til, kunnu ikki takast av embætisfólki. Fyri at loysa trupulleikarnar, ið liggja ímillum ymisk aðalráð, er tað neyðugt at viðkomandi landsstýrismennirnir seta seg saman, umrøða trupulleikarnar og taka støðu til, hvussu trupulleikarnir skulu loysast.

Mælt verður tí til, at ein tvørgangandi landsstýrisbólkur verður settur við tí endamáli at viðgera trupulleikar á gráøkjum viðvíkjandi brekaðum í Føroyum. Mett verður, at landsstýrismaðurin í almannamálum eigur at verða formaður í bólkinum.

Mælt verður til, at hesin landsstýrisbólkur verður settur varandi, soleiðis at hann kann loysa teir trupulleikar, ið eru í dag og eisini kann taka aðrar trupulleikar upp, ið fara at koma í framtíðini.

Fyri at fevna um tey málsøkir, har brekaði eru fevnd av, verður mælt til, at: landsstýrismennirnir í mentamálum, almannamálum, familju- og heilsumálum, vinnumálum og kommunumálum luttaka í tí tvørgangandi landsstýrisbólkinum. Møguleiki eigur at vera fyri, at landsstýrisbólkurin kann innkalla aðrar landsstýrismenn á fund, um tørvur er fyri tí. Møguleiki eigur eisini at vera fyri, at ein annar landsstýrismaður verður settur varandi í bólkin, um tørvur er fyri tí.

Uppgávurnar hjá landsstýrisbólkinum kundu verið hesar:

- taka upp trupulleikar viðvíkjandi gráøkjum ímillum tey ymisku aðalráðini,
- finna nøktandi loysnir á trupulleikunum,
- arbeiða við at tilevna lóggávu, kunngerðir og reglur, ið loysa gráøkistrupulleikar viðvíkjandi brekaðum,
- umrøða fíggjarligar raðfestingar viðvíkjandi brekaðum,
- umrøða hvussu politikkurin fyri brekað sum heild kann samskipast betur,
- tilevna eina ársfrágreiðing um sítt virksemi
- Virkisætlan viðvíkjandi brekaðum

Landsstýrisbólkurin eigur at hava regluligar fundir annan hvønn mánað, sum gjørt verður í Noreg.

Mælt verður til, at landsstýrisbólkurin byrjar við at loysa teir gráøkistrupulleikar, ið eru nevndir í hesum tilmæli. Harumframt eigur landsstýrisbólkurin at virka fyri, at neyðugar lógir og reglur á brekaðøkinum verða settar í gildi.

Fyri at landsstýrisbólkurin skal virka nøktandi, verður mælt til, at eitt embætisfólk frá hvørjum aðalráði verður sett í bólkin. Embætisfólkini skulu virka sum sekretariat hjá landsstýrisbólkinum. Tað vil siga, at tey skulu fyrireika fundir, taka viðkomandi evni á fundarskrá, gera tilmæli um, hvussu ymiskir trupulleikar skulu loysast o.a.

Av tí, at landsstýrismaðurin í almannamálum verður formaður í bólkinum, verður mælt til, at embætisfólkið úr Almannamálaráðnum samskipar fundirnar og tey tiltøk, ið verða sett í verk á fundunum.

### Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar

Mett verður ikki at omanfyrinevnda uppskot hevur fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar. Hetta av tí, at landsstýrisbólkurin skal nýta tey starvsfólk, ið eru sett í starv í teimum ymisku aðalráðunum til at loysa uppgávurnar. Tey fólk, ið skulu luttaka í landsstýrisbólkinum, gera hetta arbeiðið sum partur av teirra egna arbeiðið.

**Ár teirra brekaðu**

Um undirtøka er fyri at seta omanfyrinevnda landsstýrisbólk, verður mælt til, at landsstýrisbólkurin verður settur í ár, av tí at tað er "ár teirra brekaðu". Soleiðis kann landsstýrið markera, at tað raðfestir tey brekaðu høgt, og at dentur verður lagdur á at finna loysnir á brekaðøkinum.

**Niðurstøða**

Arbeiðsbólkurin vil mæla til, at omanfyrinevndi landsstýrisbólkur verður settur í ár, til varandi at taka sær av at loysa trupulleikar viðvíkjandi gráøkjum innan brekaðøkið.

Arbeiðsbólkurin hevur tilevnað eitt uppskot til upprit til landsstýrisfund (sí skjal 2), ið er ein samandráttur av hesum tilmæli. Arbeiðsbólkurin vil mæla til, at landsstýrismenninir í almannamálum, mentamálum og familju- og heilsumálum, ella bert ein av hesum landsstýrismonnum, leggja hetta upprit á landsstýrisfund til støðutakan skjótast gjørligt.

Landsstýrismenninir vinnumálum og kommunumálum eiga at verða hoyrdir, áðrenn málið verður lagt á landsstýrisfund.

Tórshavn, tann 26/11-2003

*Birita Ludvíksdóttir Poulsen* *Jan Símonsen* *Poul Nolsøe*

*Janus Jensen* *Súsanna Nordendal*

*Doris Hansen* *Anna Suffía Durhuus*

**Skjøl:**

1. Organisatiónsdiagram yvir stovnar, ið foreldur og børn við breki skulu samskifta við
2. Uppskot til upprit til landsstýrisfund
3. Bókmentalisti

Foreldur og børn við breki skulu í dag samskifta við nógv verk og stovnar innan ymisk ráð:



ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Skjal 2.

Tórshavn, tann 26.11.03
J.Nr.: 0.15-220513
Viðgjørt: BLP/jj

# Upprit til landsstýrisfund

## Um at seta ein landsstýrisbólk at viðgera gráøkismál viðvíkjandi brekaðum

### Bakgrund og málslýsing

Endamálið við hesum uppriti er at lýsa trupulleikan, ið stendst av sektorábyrgd og gera tilmæli um loysn á hesum trupulleikanum við at seta ein landsstýrisbólk at viðgera gráøkismál viðvíkjandi brekaðum.

*Sektorábyrgd*

Í Føroyum kann sigast, at tey ymisku aðalráðini hava "sektorábyrgd" á brekaðøkinum, sjálvt um hetta ikki er staðfest. Hetta merkir, at hvørt aðalráð hevur ábyrgd av at seta í verk skipanir til tey brekaðu innan sítt málsøki, t.d. innan samferðslu, arbeiði, mentan, sjúkrahúsverk, almannaverk o.s.fr.

Sektorábyrgdin hevur í fleiri førum við sær, at aðalráð vísa teim brekaðu frá sær til onnur; - kenna ikki ábyrgd av at taka teirra trupulleikar upp, av tí, at tey meta, at trupulleikin ikki hoyrir heima hjá teimum, men at okkurt annað aðalráð skal loysa trupulleikan.

*Markamótstrupulleikar*

Foreldur , avvarðandi og feløg teirra brekaðu hava í longri tíð víst á, at ein stórur trupulleiki er, at eingin samskipan er um tiltøkini, sum verða sett í verk viðvíkjandi brekaðum.

Foreldrini og avvarðandi ganga ofta oyðimarkargongd frá myndugleika til myndugleika fyri at fáa hjálp, vegleiðing og kunning um viðurskiftini. Ymiskir myndugleikar seta tiltøk í verk uttan at kunna hvønn annan um viðurskiftini, og eingin heild er um viðurskiftini hjá tí einstaka brekaða.

Tørvur er á eini „heildarloysn" fyri tann brekaða og familjuna. Ein heildarloysn merkir, at foreldur og avvarðandi fáa nøktandi kunning og hjálp umvegis eina einfalda skipan, har fáir lyklapersónar samskipa tiltøkini við tí brekaða í miðjuni.

Fyri at samskipa dagliga lívið hjá tí einstaka brekaða er tørvur á at samskipa vitan, ráðgeving og hjálpartiltøk hjá einari røð av myndugleikum/ stovnum/ skúlum/nevndum o.o. Hesi eru ikki samstundis partar í málinum, men hava størri og minni ávirkan til ymiskar tíðir. Talan kann vera um: Heilsuverkið: *Sjúkrahús, kommunulæknar, serlækna og tannlæknar.* Almannaverkið: *Almannastovan, sosialar nevndir, barnanevndir, sosialráðgevar, brektoymi, hjálpartól og stuðulsfólk, heilsusystrar.* Kommunumál: *Barnagarðar, námsfrøðingar, sosialar nevndir, sernámsfrøðingar, stuðlar.* Skúlaverkið: *Sernámsdepilin, skúlar, skúlaleiðarar. Serlærarar og lærarar.* Arbeiði og samferðsla: *Arbeiðsloysisskipanin, arbeiðsmarknaður, stuðul við barnsburð, samferðsla.*

Harumframt er eisini tørvur á at áseta lógir og reglur á teim ymisku málsøkjunum, ið tryggja at brekað ikki detta niðurímillum tær ymisku skipanirnar og fáa eitt verri tilboð, enn aðrir borgarar í Føroyum.

Trupulleikarnir við at brekað tíðum detta niðurímillum teir ymisku myndugleikarnir, eru størst ímillum Almannamálaráðið, Familju- og heilsumálaráðið og Mentamálaráðið, men trupulleikar kunnu eisini verða ímillum Vinnumálaráðið og hini aðalráðini, av tí, at Vinnumálaráðið hevur samferðslu og arbeiðsmarknað sum málsøki. Harumframt verða eisini gráøkir ímillum kommunurnar og landið viðvíkjandi brekaðum so hvørt, sum fleiri øki verða løgd út til kommunurnar at umsita. Barnaansingarøkið er lagt út til kommunurnar at umsita tann 1. apríl 2000, og væntandi verður forsorgarøkið, eldraøkið og barnaverndarøkið eisini lagt út til kommunurnar at umsita í nærmastu framtíð. Hetta gevur gráøkistrupulleikar ímillum Kommunudeildina í Løgmálaráðnum og hini aðalráðini.

**Hvussu verða gráøkistrupulleikar loystir í Danmark, Noregi og Svøríki**

Danmark, Svøríki og Noregi hava sektorábyrgd á brekaðøkinum. Stjórnirnar í hesum londum hava sett ráðharrabólkar til at samskipa gráøkistrupulleikar á brekaðøkinum.

Í ráðharrabólkunum luttaka teir ráðharrar, ið hava við trupulleikar hjá teimum brekaðu at gera. Tað er eitt sindur ymiskt, hvør situr í ráðharrabólkunum, men samanumtikið kann sigast, at hesir manna bólkarnar: almannamálaráðharrin, vinnumálaráðharrin, heilsumálaráðharrin, fíggjarmálaráðharrin, granskingarmálaráðharrin, mentamálaráðharrin, ferðslumálaráðharrin, undirvísingarmálaráðharrin, íbúðarmálaráðharrin og innanríkismálaráðharrin.

Uppgávurnar hjá ráðharrabólkunum eru m.a., at:

- samskipa økið,
- finna loysnir á gráøkistrupulleikum,
- umrøða fíggjarliga tørvin á økinum í samband við fíggjarlógina,
- umrøða og tilevna eina strategi á økinum,
- umrøða lógaruppskot, aðalorðaskifti o.a., ið hava við brekað at gera.

Ráðharrabólkarnir hava fund uml. 5-6 ferðir um árið. Til at fyrireika fundir í ráðharrabólkunum og gera uppfylgjandi arbeiðið eru stovnsettir samsvarandi arbeiðsbólkar við embætisfólkum frá teimum somu aðalráðunum (samskipanarbólkar). Hesir bólkar umrøða eisini trupulleikar/samskipan sum ikki krevja viðgerð á politiskum støði.

Í Noreg hevur verið ein ráðharrabólkur fyri tann samlaða politikkin á brekaðøkinum í meira enn 10 ár.

**Uppskot um loysn**

Mett verður, at tað eisini er neyðugt at seta ein líknandi landsstýrisbólk í Føroyum til at taka sær av at loysa trupulleikar viðvíkjandi gráøkjum innan brekaðøkið.

Á nógvum av teimum økjum, har trupulleikar eru viðvíkjandi gráøkjum ímillum mentamál og almanna- og heilsumál, liggja longu drúgv og væl úr hondum greidd álit. Trupulleikin er, at nógv av hesum álitum ikki eru sett í verk.

Orsøkin til hetta er møguliga tann, at í flestu málum viðvíkjandi gráøkistrupulleikum væntar politisk støðatakan í málinum. Tær neyðugu politisku støðutakanirnar, ið skulu til, kunnu ikki takast av embætisfólki. Fyri at loysa trupulleikarnar, ið liggja ímillum ymisk aðalráð, er tað neyðugt at avvarðandi landsstýrismenn seta seg saman, umrøða trupulleikarnar og taka støðu til, hvussu trupulleikarnir skulu loysast.

Skotið verður upp, at ein tvørgangandi landsstýrisbólkur verður settur við tí endamáli at viðgera trupulleikar á gráøkisøkjum viðvíkjandi brekaðum í Føroyum. Mett verður, at landsstýrismaðurin í almannamálum eigur at verða formaður í bólkinum.

Skotið verður upp, at hesin landsstýrisbólkur verður settur varandi, soleiðis at hann kann loysa teir trupulleikar, ið eru í dag og taka upp trupulleikar, ið fara at koma í framtíðini.

Fyri at fevna um tey málsøki, sum taka avgerðir viðvíkjandi brekaðum, verður skotið upp, at: landsstýrismenninir í mentamálum, almannamálum, familju- og heilsumálum, vinnumálum og kommunumálum luttaka í tí tvørgangandi landsstýrisbólkinum. Møguleiki eigur at vera fyri, at landsstýrisbólkurin kann innkalla aðrar landsstýrismenn á fund, um tørvur er á tí. Møguleiki eigur eisini at verða fyri, at aðrir landsstýrismenn luttaka varandi í bólkinum, um tørvur er á tí.

Uppgávurnar hjá landsstýrisbólkinum kundu verið hesar:

- taka upp trupulleikar viðvíkjandi gráøkjum ímillum tey ymisku aðalráðini,
- finna nøktandi loysnir á trupulleikunum,
- arbeiða við at tilevna lóggávu, kunngerðir og reglur, ið loysa gráøkistrupulleikar viðvíkjandi brekaðum,
- umrøða fíggjarligar raðfestingar viðvíkjandi brekaðum,
- umrøða hvussu politikkurin fyri brekað sum heild kann samskipast betur,
- tilevna eina ársfrágreiðing um sítt virksemi,
- gera virkisætlan viðvíkjandi brekaðum

Landsstýrisbólkurin eigur at hava regluligar fundir annan hvønn mánað, sum gjørt verður í Noregi.

Mælt verður til, at landsstýrisbólkurin byrjar við at loysa teir gráøkistrupulleikar, ið eru nevndir í hesum tilmæli. Harumframt eigur landsstýrisbólkurin at virka fyri, at neyðugar lógir og reglur á brekaðøkinum verða settar í gildi.

Fyri at landsstýrisbólkurin skal virka nøktandi, verður mælt til, at eitt embætisfólk frá hvørjum aðalráð verður sett í bólkin. Embætisfólkini skulu virka sum sekretariat hjá landsstýrisbólkinum. Tað vil siga, at tey skulu fyrireika fundir, taka viðkomandi evni á fundarskránna, gera tilmæli um hvussu ymiskir trupulleikar skulu loysast o.a.

Av tí at landsstýrismaðurin í almannamálum verður formaður í bólkinum, verður mælt til, at embætisfólkið úr Almannamálaráðnum samskipar fundirnar og tey tiltøk, ið verða sett í verk á fundunum.

### Fíggjarligar og umsitingarligar avleiðingar

Mett verður ikki at omanfyrinevnda uppskot hevur fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar. Hetta av tí, at landsstýrisbólkurin skal nýta tey starvsfólk, ið eru sett í starv í teimum ymisku aðalráðunum til at loysa uppgávurnar. Tey fólk, ið skulu luttaka í landsstýrisbólkinum gera hetta arbeiðið sum partur av teirra egna arbeiði.

### Ár teirra brekaðu

Um undirtøka er fyri at seta omanfyrinevnda landsstýrisbólk, verður mælt til, at landsstýrisbólkurin verður settur í ár, av tí at tað er "ár teirra brekaðu". Soleiðis kann landsstýrið markera, at tað raðfestir tey brekaðu høgt, og at dentur verður lagdur á at finna loysnir á brekaðøkinum.

### Niðurstøða

Skotið verður sostatt upp, at omanfyrinevndi landsstýrisbólkur verður settur í ár.

**Páll á Reynatúgvu**
landsstýrismaður

**Bill Justinussen**
landsstýrismaður

**Anita á Fríðriksmørk**
landsstýriskvinna

Skjal 3.

# Bókmentalisti:

**Føroyskt tilfar:**

Áheitan frá MBF, Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum, til Føroya Løgting, at virka fyri viðurskiftum teirra brekaðu,
MBF, december 1993

Álit um teknmálsmiðstøð og tulkatænastu,
Arbeiðsbólkur umboðandi deyv/tunghoyrd, 29. mai 1995

Álit um flutningsskipan fyri brekað í Føroyum,
Landsstýrið setti í 1989 ein arbeiðsbólk, ið handaði álit í juni 1990

Álit um endurbúgving og Alv-skúlan,
Almanna- og heilsumálastýrið, 1996

Álit um aktivering av forsorgarlógini,
Landsstýrið niðursetti í 1994 ein arbeiðsbólk, ið handaði álit í februar 1996

Álit um rationaliseringar og sparingar í fólkaskúlanum, sernámsfrøðiliga virkseminum v.m.
Mentamálastýrið, februar 1996

Álit um hvussu ein eftirskúli fyri menningartarnað kann verða skipaður í Føroyum,
Mentamálastýrið, 1996

Hjálpartólaveiting – trupulleikar og loysnir,
Almanna- og heilsumálastýrið, apríl 1999

Sameindu Tjóða: Fyrimyndarreglur um javnar møguleikar fyri fólk, ið bera brek,
Almanna- og heilsmálastýrið, 1999

Pallborðsfundur í Norðurlandahúsinum: Vælskapt brek
Norðurlandahúsið, september 2000

Psykiatriætlan,
Landsstýrið niðursetti í 1990 arbeiðsbólk, ið handaði álit í 2000

Ein lýsing av stuðulsfólkaøkinum – og eitt tilmæli um eina aðra skipan,
Almanna- og heilsumálastýrið, apríl 2001

Tilmæli um sernámsfrøði,
Mentamálastýrið setti í 2000 ein arbeiðsbólk, ið handaði tilmæli í juni 2001

Fólkaskúlalógin – ein avbjóðing,
Mentamálastýrið, desember 2001

Ávegis álit um skúlatilboð til ungmenningartarnað,
Mentamálastýrið, november 2002

Heildarloysn til skúlabørn á Sernámsdeplinum,
Samstarvsbólkurin, mai 2002

Álit um heildapsykiatri,
Almanna- og heilsumálastýrið, januar 2002

**Tilfar úr Norðanlondum:**

**Betænkning om pædagogisk-psykologisk rådgivning til børn og unge (PPR)**
Holbæk, Jernløse, Stenlille og Tølløse kommune, Danmark, 1980.

**B-U-A Projektet**
Søren Sønnersgaard, Præstevænget 11, 3720 Aakirkeby
Danmark, 1995

**Det forskningspolitiske sektoransvar**
Af Egil Kallerud,
Forskningspolitikk nr. 3/96

**Vejledning nr. 43 af 5/3 1998 til lov om social service: om sociale tilbud til voksne med handicap**
Socialministeriet,
Danmark, 1998

**Vejledning nr. 58 af 10/3 1998 til lov om social service: om vejledning om sociale tilbud til børn og unge med handicap**
Socialministeriet
Danmark, 1998

**Helhedsorienteret indsats over for personer, der er truet af livslang marginalisering**
Peter Gulstad/Bjarne Ottesen

**Skriftlig plan for børn og unge med nedsat funktionsevne**
Et arbejdsredskab til helhedsorienteret sagsbehandling
Vestsjællandsamt, Danmark, juni 1999

**Handikappolitik i Norden**
Strategier for likestillingsarbetet i de nordiske landene
NNH 4/97 Nordiska namnden for handikappfrågor

**Orientering nr. 2**
Sosialministeriets evalueringsprogram
Danmark, november 2000

**Beretning om Den handicappolitiske udvikling 1999/2000**
Regeringens beretning om den handicappolitiske udvikling 1999/2000 afgivet af socialministeren, Danmark, 2001

**Kortversjon av NOU 2001:22. Fra bruker til borger**
En strategi for nedbygging av funksjonshemmede barrierer.
Sosial-og helsedepartementet
Norge, 2001

**Dansk handikappolitik**
Lige muligheder gennem dialog
Det Centrale Handicapråd
Danmark, april 2002

**Frem mod bedre specialundervisningen**
- information om kvalitetsprogrammet KVIS
Undervisningsministeriet, Uddannelsesstyrelsen, KVIS programmer
Danmark, maj 2002

**Fra kaos til system med bruker i fokus**
Samtak – Kompetenseudviklingsprogram for PPT og skoleledere
Norge, 2002

**Rådgivning til familier med sent udviklede eller handikappede børn 0 – 6 år.**
Vestsjællandsamt, Danmark, oktober 2002

**St.meld.nr. 40**
Stortingsmelding nr. 40 frå 2002-2003 om nedbygging av funksjonshemmede barrierer: Strategier, mål og tiltak i politikken for personer med nedsatt funksjonsevne
Det kongelige socialdepartement, Norge

**Status over udviklingen i ligebehandlingen af handicappede**
Center for ligebehandling af handicappede, statusberetning
Danmark, 2003